Pedagogur

Innan Almanna- og Heilsumálastýrið og stovnar undir tí, við fyribils tænastu á Bústovninum og Sambýlinum á Rúnarvegi í Runavík, er eitt tænastumannastarv sum pedagogur leyst at søkja frá 1. apríl 2002 ella skjótast tilber.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, sett eftir sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, lønt eftir lønarstig 24 – 31.

Uppgávan er at arbeiða í Sambýlinum hjá 3 monnum við autismu, og arbeiðstíðin fevnir um dag-/kvøld-/náttar- og vikuskiftisvaktir.

Arbeiði krevur, at viðkomandi umsøkjari er kroppsliga væl fyri, fyri at kunna gera kroppsligt arbeiði saman við monnunum, ganga túrar, svimja, fimleik o.a.

Starvið er ætlað pedagogi, men um ongin skikkaður pedagogur søkjur, verður starvið fyribils sett við fólki við aðrari útbúgving.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðufólkið á tlf.: 448424.

Skrivlig umsókn við prógvi, viðmæli v.m. skal vera okkum í hendi, í seinasta lagi 20. mars 2002 og skal sendast til:

Bústovnin á Rúnarvegi
att.: Fyristøðufólkið
FO–620 Runavík

Frá Føroya Psoriasisfelag

6. apríl verður aftur farið til Íslands til viðgerð fyri psoriasis.

Tey, ið hava tørv á viðgerð og kundu hugsa sær at komi við, skulu fara til egnan kommunulækna. Læknin fyllir út umsóknarblað og sendir tað til Landssjúkrahúsið.

Umsóknin skal vera Landssjúkrahúsinum í hendi seinast 11. mars.

Eru ivaspurningar ber til at ringja á tlf. 424179

Vinarliga

Føroya Psoriasisfelag

Um hóskandi boð fæst, verður

Partafelagið ZENITA

lýst til sølu.

Partafelagið rekur tveir ídnaðartrolarar, M/S BERIT S – TG 640 og M/S Zenita – TG 540.

Eisini eigur, og luttekur felagið í øðrum vinnufyritøkum.

Áhugaði kunnu venda sær til:

Atlantic Brokers
tlf: 312238 • fax: 310907
e-mail: sc@atlantic-brokers.com

Avloysastarv á Ferðaráð Føroyta

Ferðaráð Føroyta sóknast eftir einum starvsfólki til marknaðardeildina í samband við farloyvi. Starvið er eitt fulltíðarstarv í eitt ár og verður at seta sum skjótast.

Arbeiðið fevnir um marknaðararbeiði, so sum messuluttøka, samskifti við ferðasmiðir, ferðaskrivstovur og fjølmiðlar, framleiðsla av faldarum og samskifti við føroysku ferðavinnuna. Marknaðirnir eru í høvuðsheitum Týskland, Eysturríki, Sveis og Frakland.

Arbeiðið verður lagt til rættis í samstarvi við leiðsluna.

Vit vænta, at umsøkjarin hevur hesar førleikar:
- Útbúgving og royndir innan ferðavinnu, marknaðararbeiði og møguliga innan verkætlanarleiðslu
- Holla vitan um Føroyar sum ferðamannaland og føroysk viðurskifti sum heild
- Kunnleika til og um aktørar í ferðavinnuni
- Hevur góðan telduførleika og málkunnleika
- Hevur góð samstarvsevnir og dugir at arbeiða sjálvstøðugt

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið/viðkomandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn skal vera Ferðaráðnum í hendi, í seinasta lagi 18. mars 2002.

Ferðaráð Føroyta
Postsmoga 118
110 Tórshavn

Ynskjast fleiri upplýsingar um starvið, kunnu áhugaði venda sær til stjóran, Heri Niclasen, á tlf.: 316055.

Skrivstovufólk

IRF søkir við hesum eftir einum skrivstovufólki at byrja 1. apríl 2002, ella skjótast gjørligt.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, sum m.a. fevnir um:
- avgreiðsluarbeiði
- bókhaldshjálp
- vanligt skrivstovuarbeiði

Allar skrásetingar verða dagliga førdar á teldu, og er tað tí avgjørt neyðugt, at umsøkjarin hevur góðan praktiskan og teoretiskan kunnleika til skrivi-, rokni-, og telduarbeiði. Kunnleiki til bókhaldsskipanina Concorde Axapta er ein fyrimunur.

Arbeiðið er fjølbroytt, hevur nógvar persónligar menningarmøguleikar, eins og tað setur krøv til góð samstarvsevni, menniskjansligan og fakligan førleika. Alt hetta í einum góðum arbeiðsumhvørvi.

Lønin verður sett eftir avtalu við avvarðandi yrkisfelag.

Hevur tú áræði, kann virka sjálvstøðugt og hevur skrivstovuútbúgving ella royndir innan hetta yrkið, ert tú møguliga tann, vit søkja.

Nærri fæst at vita við at tosa við Erik Lervig ella Poul Andrias Joensen, tlf. 443343.

Skrivlig umsókn saman við upplýsingum um arbeiðsroyndir, avriti av prógvum og møguligum ummælum verður at senda til IRF, og skulu verða okkum í hendi innan fríggjadagin 15. mars 2002.

IRF
Att.: Poul Andrias Joensen
Postboks 39
FO-520 Leirvík

Viðvíkjandi P/F 413 , P/F Handilsvirkið P.A. Restorff í likvidatión, 100 Tórshavn

Vísandi til § 72 í " Lov om Aktieselskaber" frá 15. apríl 1930, skal Skráseting Føroya við hesum, heita á nevndina/likvidator í omanfyri nevnda felag, um innan 3 mánaðar frá í dag at upplýsa um felagið enn er til. Um Skrásetingin einki hevur frætt tá henda freist er farin, verður felagið strikað úr Skrásetingini.

Skráseting Føroya 01. mars 2002

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 1814, P/F Føroya Møblasøla, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 13.02.2002.
Nýtt hjánavn: Ide Møblar (P/F Føroya Møblasøla)

Skráseting Føroya tann 1. mars 2002

Kristin Balle

Sosialurin Sosialurin -har tað hendir

HESTPRENT

BØKUR, BØKUR, BØKUR
og alt annað prent

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

EYKALUTIR
til VW Golf/Jetta, árg. 84-90, motorhjálmur, høgra hurð, kúfangari, dekk, lyktir, motorur við gearkassa o.a. Bíliga til sølu!
Tlf. 253560 ella 320001

TOYOTA CARINA II
diesel, árg. 87 til sølu fyri 5.000 kr. Krevur ábøtur. Hevur ikki nummarplátur.
Tlf. 421258 ella 264440

NISSAN JEEPUR
Nissan Patrol GR 4.2, árg. 3/90, 227.000 km, svartur við breiðum felgum og Pioneer anleggi, nýliga rustviðgjørdur, til sølu.
Tlf. 319534 / 219534

KAVADEKK TIL SØLU
Fýra alu felgur við kavadekkum, std. 185x14, passa til Honda Civic, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 314089

MOTORUR
til Toyota HiAce árg. 89, 2.4 Diesel, til sølu fyri 4.500,- kr.
Tlf. 213250

TOYOTA HiAce 2.4 DIESEL
árg. 86, til sølu sum eykalutur fyri kr. 3.500,-
Tlf. 213250

VØRUVOGNUR TIL SØLU
Chevrolet vøruvognur, diesel, v/ aut. gear, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 213388 ella 217406

NISSAN PATROL TIL SØLU
Nýsýnaður Nissan Patrol 3.3. Turbo til sølu, sær væl út.
Tlf. 259148

BILUR TIL SØLU
Mazda 323 typa AB árgang 97. Sera væl hildin, koyrt gott 60.000 km. Fýra nýggj heilársdekk + 2 summardekk. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 371206

BMW 320i
árg. 87, koyrt 96500 km, til sølu.
Tlf. 220880

SUMMARDEKK
Fýra nýggj summardekk, brúkt juli til sept. til Opel Ascona, 13" við felgum til sølu.
Tlf. 333219

OPEL ASCONA
árg. 88, er í góðum standi, krevur ábøtur, sýnaður 2001 til sølu.
Tlf. 333219

TOYOTA CARINA E
1600 árg. 93, í góðum standi, selist vegna flyting.
Tlf. 422230

NISSAN BLUEBIRD
1.8i Turbo, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 448796

TIL SØLU
Fýra lítið brúkt dekk – Ultra Grip 6, 185/65-R14. Felgur fylgja við.
Tlf. 315133

TIL SØLU
Deilir til Toyota Carina II, árg. 88-91, bíliga til sølu.
Tlf. 253511

PÍKADEKK
Fýra pikadekk á 13" felgum til Toyota Corolla til sølu fyri hálvan prís.
Tlf. 373947

TIL SØLU
Ein reyður Ford Transit bussur, árg. 87 við bensinmotori, til sølu fyri kr. 17.000
Tlf. 316022/252922

PÍKADEKK TIL SØLU
4 brúkt pikadekk til sølu fyri 500 krónur. Pirelli 175/70 r 13 820. simin_osa@ntm.org
Tlf 228492/321476

YNSKIST
Kølivatnspumpa til Mazda 626 2,0, árg. 84, ynskist til keyps.
Tlf. 311532

BMW 320i V6
árg. 91, hvítur, sera væl hildin, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 219088

FORD ESCORT XR3I
í góðum standi, árg. 87, hevur elrútar og sóltak, bíliga til sølu.
Tlf. 217102

FORD SIERRA 1,8
árg. 84, koyrt 148.000 km, til sølu. Gevið eitt boð.
Tlf. 310445

NISSAN BLUEBIRD T12
árg. 87, til sølu. Bilurin hevur plátur og er seinast sýnaður tann 29. mai 2001.
Tlf. 320561 / 251075

HONDA ACCORD
í hampuligum standi, árg. 87, til sølu fyri 6.000 kr. Sporstfelgur fylgja við.
Tlf. 455811 ella 222760

NISSAN BLUEBIRD
árg. 86, nýsýnaður 18.2.2002. Góð summardekk og nýggj heilársdekk til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 448860 / 260264

YNSKIST
Toyota Corolla GTi ella GSi ynskist til keyps.
Tlf. 222764

PEUGEOT 206
Spildurnýggjur, bláur Peugeot 206 XS HDI 2,0, koyrt 6.000 km, til sølu fyri 140.000 kr.
Tlf. 217771

TOYOTA CARINA E XLI
árg. 95, koyrt 100.000 km, í góðum standi. Ring, so tosa vit um prís.
Tlf. 448537

YNSKIST
4 x 4 brúktur Pick-up ella jeepur ynskist til keyps.
Tlf. 313375

TIL FORD FIESTA
v. fjarðabein, v. upphang til Ford Fiesta 1.3, árg. 89-94.
Tlf. 448634 ella 218634

TIL SØLU
Ein Nissan Sunny Diesel st.car. árg. 89, Typa B11, til sølu sum eykalutur. Fá meiri at vita á
tlf. 212533

EIN ELDRI
Toyota Camry til sølu fyri 2000 kr. sum eykalutur, fýra dekk fylgja við.
Tlf. 252199 eftir kl. 19

PÍKADEKK TIL SØLU
Fýra brúkt pikadekk til sølu fyri 200 kr. pr. stk. Stødd 155/80 R13.
Tlf. 316580

SUZUKI SWIFT
Suzuki Swift, árg. 86, bíliga til sølu. Ring og hoyr meira.
Tlf. 252800

TIL SØLU
Hvítur VW Transporter til sølu sum eykalutir. Árg. 87.
Tlf. 214522 - 316088

TIL SØLU
Suzuki Swift, árg. 86, til sølu sum eykalutir. Alt útstoytið nýtt.
Tlf. 251240 - 261433

HURÐ YNSKIST
Høgra hurð til VW Polo, árg. 88, ynskist til keyps.
Tlf. 421394

Amboð

BLANDIMASKINA TIL SØLU
Lítið brúkt Lescha blandimaskina, 1/2 sekkur) til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 211974

AMBOÐ
· Tvangsblandarir
· Blandimaskinur
· Glittemaskinur
· Bjálkavibrator
· Stavivibrator
· Betongslípimaskinur
og mangt annað
Søla & útleigan
Kaj Andreasen & Co
Tel. 315600 - Fax 318008

Arbeiði

ARBEIÐI YNSKIST
24 ára gamal maður søkir arbeiði innan byggivinnuna. Hevur áður arbeitt í byggivinnuni.
Tlf. 316451

ÁLÍTANDI KONA SØKIST
til húsarbeiði 1 tíma um morgunin og tveir tímar seinnapart, at byrja beinanvegin.
Tlf. 424091 / 263626

ARBEIÐI YNSKIST
Eg ætaki mær alt fyrifallandi vaskiarbeiði fyri stovnar, virkir og annað.
Tlf. 443368 - 256158

Barnaansing

ER NAKAR
ið tímir at ansa eftir 10 mðr. gomlu Vár 8 1/2 tíma um vikuna, so vinarliga ring
Tlf. 316706 ella 216990

VILT TÚ HJÁLPA MÆR?
Eg eri hálvt ár og verði einsamøll, tá mamma skal arbeiða. Vilt tú hjálpa mær? Eg kenni eisini onnur, tú kanst ansa eftir.
Tlf. 310828

GENTA/KONA SØKIST
Álítandi og barnavinarlig genta/kona søkist at ansa eftir 15 mðr. gamla Sámuel vikudagar. Her hjá okkum ella heima hjá tær.
Tlf. 321599

DAGPLEYGUMAMMA
í eystur/miðbýnum søkist at ansa eftir 15 mðr. gamla Sámuel vikudagar.
Tlf. 321599

Barnaútgerð

TIL SØLU
Barnasong v/madrassu, dýnu, kodda, toykanti (til gentu), 4 løk, 3 seingjarsett, teppi (til gentu) skrástólur.
Tlf. 227044 eftir kl. 15

TIL SØLU
Myrkabláur Brio barnavognur við tilhoyrandi lyft, tasku, fluguneti, regnslagi og selum til vognin. Sera vælhildið, brúkt til eitt barn.
Tlf. 310797

BARNAVOGNUR
Model Simo 299 Lux, við Simo puslitasku, regnslag og flugunet. Er lítið brúktur og sær út sum nýggjur. Til sølu fyri kr. 2.800,-
Tlf. 447275

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Myrkur leðurlook barnavognur við babylyft, føroyskur skinnposi, bílbarnastólur og pusliborð. Selist samlað fyri kr. 1500,-
Tlf. 424666

BRIO BARNAVOGNUR
Myrkabláur Brio barnavognur við lyft og tasku til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 318522, e. kl. 16

Bátaútgerð

NEYST Á KAIØKINUM
í Sørvági 10 x 4 m. og »gamli bilskúrin« hjá N. N. til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 221866

FISKILOYVI YNSKIST
undir 15 tons. Eg mangli eitt, so ring til mín skjótast gjørligt.
Tlf. 0045 40811918

SNELLA TIL SØLU
Nýggj óbrúkt svensk el snella. BI5000. 12 og 24 volt til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 314314 ella 213276

TIL SØLU
Línuspæl við hydraliktanga og trýstventili.
Tlf. 327069 ella 217069

BÁTAMOTORUR
Ein 5-6 HK páhangari ynskist til keyps.
Tlf. 315451

Bingo

KAGGIN
Páskabingo verður leygardagin 9. mars kl. 15 fyri børnum og kl. 19 fyri vaksnum. 15 vinningar á lutaseðli m.a. føroysk páskaregg, 2 gávukort á 1.000. Eisini verður spælt bingola, og 20 kr. spæl.
Kaggin

EYDNUHJÓL
Stórt eydnuhjól verður á Fossánesi leygarkvøldið 9. mars frá kl. 20.00. Hópin av góðum vinningum. Stór føroysk páskaegg, kjøt, karamellur, sodavatn, Sunkist, kurvar, troyggjur, steikir, ur, fototól, leikur, olja, krov, fartelefonir Nokia 3330 og mangt, mangt annað. Vælkomin.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

HEY SUÐUROYINGAR!
Um veðrið loyvir tí, hava vit bingo í Trongisvági tórskvøldið 7. mars kl. 19. Hvørt bingo gávukort á kr. 300 burturluting gávukort á kr. 150, 200 og 500 kr
Tvøroyrar Svimjifelag

PÁSKABINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum hósdagin 7. mars kl. 19.00. 15 plátur 100,- Full pláta 400,-. 15 vinningar á lutaseðli m.a. páskaregg. 2 x 500, 1 x 1000. Drigið millum spølini. Eykaspæl. Koyring heim.
Argja Róðrarfelag

PÁSKAREGGJATOMBOLA
Týsdagin 5. mars kl. 17 verður páskareggjatombola í skúlanum í Miðvági. Ágóðin fer til Beitishúsini.
Vága Dansifelag

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu 11.3. kl. 19. Nógvir góðir vinningar m.a. ræst og feskt kjøt. 15 plátur 100 kr. Koyring heim aftaná.
Astma- og Allergifelagið

PÁSKAEGG
Stórt páskaeggtombola verður á Statoilstøðini leygardagin 2. mars frá kl. 10-13 og frá 19-22. Ein ørgrynna av eggum, uml. túsund. Føroya størsta. Vælkomin.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

TOMBOLA
við 200 páskaeggum verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 2. mars kl. 15.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.
KFUM skótarnir í Kvívík

PENSIONISTAFELAGIÐ
Í HAVN hevur bingo hóskvøldið 7. mars. kl. 18.00 í Losjuni, TInghúsvegur 18.
Nevndin

GOTT PÁSKABINGO
Verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 16. mars kl. 16. 12 plátur 100 kr. Full pláta 300 kr. Drigið verður millum spølini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

GOTT BINGO
Verður í Glæmuni í Kvívík týskvøldið 5. mars kl 19. 12 plátir 100 kr. Full pláta 300 kr.Drigið verður millum spølini.Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Burturm. /funnið

BRILLUR FUNNAR
Eg havi funnið einar brillur uttanfyri Restorff á Landavegnum sunnudagin 24. februar.
Ring 317686 ella 217802

BRILLUR FUNNAR
á Kambsdali 14. febr.
Tlf. 444774

NOKIA FARTELEFON
funnin í Sjúrðargøtu mánamorgunin 25. febr. Eigarin fær hana við at ringja
Tlf. 313520, e. kl. 17

GIFTIRINGUR FUNNIN
á Sandvíkahjalla. Í ringinum stendur »Tín Rógvi 18.8.1999«. Ringurin fæst við at ringja
Tlf. 264467 - 322467

Býli

TIL LEIGU
Í miðbýnum í Havn verður ein lítil íbúð á 50 kvm. til leigu frá 1. mai. Íbúðin er góð til 1 ella 2 fólk. Húsaleigan er 4000 kr. um mánaðin við ljós og hita. Skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 1292-1

YNSKIST
Eg ynski mær ein reyðbrúnan striputan kettling – frens.
Tlf. 223282 ella 456318

ÍBÚÐ YNSKIST!
Einlig mamma við einum barni søkir íbúð í Havn/Argjum skjótast gjørligt. Eru friðarlig og fara væl um. Max. 4500 við hita.
Tlf. 253166

KAMAR TIL LEIGU
Kamar í miðbýnum í Havn við atgongd til køk, felagsrúm og vaskimaskinu til leigu til edrúliigt fólk.
Tlf. 251627, e. kl. 16

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Bræveskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

in ana vao ni i aafi o a. .v. . a in i aa ai avao ni a i i. in ana i aa afioa ii aif nn ona.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki